# Tíðirnar skifta, men Heine er tann sami



*Heine Lützen slepti teymunum og vísti okkum sín innara showmann*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Heine Lützen hevur flutt nógv mørk innan kristiligan føroyskan tónleik. Við framførsluni á Fjarðafestivalinum flutti hann eingi mørk, men spældi eina sera góða og 100% Heine Lützen konsert**

UMMÆLI
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Heine Lützen er ein av pionerunum innan kristiligan rokk, og á konsertini í leygarkvøldið upplivdu vit 100% Heina. Heine og hansara sera vælleikandi bólkur royndu ikki at bróta upp úr nýggjum. Hetta var Heine, sum vit kenna hann við rættiliga rock'n'roll kendum løgum og so inniligum lovsongstulkingum av klassiskum sálmum. Væl bakkaður upp av góðum tónleikarum og kórrøddunum hjá systir síni og hjá Jónsveini Heinesen, stóð Heine á tryggari grund, og hetta gav hon fríar teymar, at sleppa innara showmanninum út.

Eg havi onkuntíð eftirlýst, at Heine sleppur sínum innara Elvis út, og tað gjørdi hann í fult mát á hesi konsertini, Heine rokkaði og spældi útum pallkantin.

## RocKingo'roll

Serliga stuttligt var at hoyra ein Kingo sálm í reindyrkaðari rock'n'roll ella skuldi eg sagt RocKingo'roll útgávu. Serliga dýrabart var, at næsta lag eisini var ein Kingo sálmur, ið varð tulkaður í hinum klassiska Heina stílinum, sum ein inniligur lovsongur.

Røddin var í nógvum løgum nakað snjallari, enn vit vanliga uppliva frá Heina, men í teimum inniligu løgunum, var røddin eins góð og altíð og boraði seg beint inn í hjarta á áhoyrarunum.

Størsta áskoðarahittið mundi vera, tá Heine sang sunnudagsskúla sangin "Gev mær olju á lampuna", tá sang allur salurin við. Men tað gjørdi salurin eisini í inniliga endanum "Jesus hitt einasta", ið nokk er størsta hittið hjá Heina.

## Tann sami Heine

Sum pionerur hevur tú eina serstøðu, tú hevur gjørt títt, og tú hevur ikki altíð tørv á at endurnýggja teg. Ja, tað kann til tíðir vera serliga stuttligt at uppliva, at tú ert tann sami, og hóast tíðirnar eru skiftar, síðan Heine í bólkinum Samsint kollvelti kristiligan føroyskan tónleik, so er Heine til alla lukku tann sami.



*Ulf Christiansson er ein karismatiskur oddamaður, og hetta kom til sjóndar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nostalgir gittartru

**Rokkbólkurin Jerusalem var í Føroyum 1988, tá var tónleikurin hjá teimum kanska meira uppi í tíðini. Á Fjarðafestivalinum 2007 var tað ikki minst av nostalgiskum ávum, at fólk vóru spent at hoyra teir**

UMMÆLI
Oddur á Lakjuni
planet@sosialurin.fo

Tað var einki fjas, tá ið Jerusalem fór á pallin á veðurbarda graslíkinum aftan fyri Kelduna. Teir vildu rokka, soleiðis sum teir hava gjørt seinastu 30 árini. Teir høvdu ikki hugsað um klæðir ella annað til eyguni. Teir vildu bara spæla rokk, og við honum at fáa út boðskapin um evangeliið.

Sangarin Ulf Christiansson hevur sjálvur stovnað bólkin og hevur alla tíðina verið berandi limurin í bólkinum. Hann er ein karismatiskur oddamaður, og tað kom til sjóndar hóast regn og ljóðtrupulleikar. Hann hevur eina hása rødd, sum røkkur víða.

Ímóti endanum á konsertini gav hann sær góða tíð at greiða frá sínum vitnisburði, og hví hann helt á at spæla

# Progressivur poppur í regnin



*Petur og bólkur hansara tyktust at elska at framføra tónleikin, og spæligleðin smittaði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Petur Háberg og bólkur hansara spældu ein ta bestu framførsluna á Fjarðafestivalinum í oysregni á graslíkisvøllinum aftan fyri Kelduna**

UMMÆLI
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Petur Háberg og hansara bólkur høvdu eina stóra avbjóðing við at fáa fólk út í regnið at lurta eftir sær, og enn størri avbjóðing við at halda fólk úti í regninum. Hetta vóru teir eisini greiðir yvir, og Petur segði bart út, at hann ikki bleiv firtin, um fólk fór inn í turru Kelduna, men sum framførslan gekk, legðist fólk afturat, og bert fá fóru inn at kroka.

Petur var fyri nøkrum vikum síðan, tann seinasti, ið megnaði at gjøgnumføra sína framførslu á Summar Festivalinum, og sum hann stóð har í regninum aftan fyri Kelduna, segði hann